FØROYA FIMLEIKASAMBAND

FFS

ETISKAR LEIÐREGLUR

góðkendar á aðalfundi tann 31. mai 2017

(Dagført á aðalfundi 17. juni 2026)

Etiskar leiðreglur

Hesar leiðreglur byggja á leiðreglur um góðan atburð hjá Ítróttarsambandi Føroya frá 2008. Leiðreglurnar eru galdandi fyri venjarar, leiðarar, samskiparar, foreldur, fimleikarar, dómarar og fyriskiparar.

Føroya Fimleikasamband vil við hesum leiðreglum gera sítt til, at børnini, tey ungu eins og foreldur og avvarandi saman við teimum, ið varða av fimleikinum, fáa eina góða byrjan og í framtíðini góðar upplivingar í fimleikaumhvørvinum.

Hesar leiðreglur siga nakað um, at vit skulu fara væl um hvønn annan og hava virðing hvør fyri øðrum, so at fimleikaumhvørvið er eitt gott og trygt umhvørvi, har øll kunnu kenna seg væl, verða vird og gleða seg at koma saman.

Til dømis kunnu feløgini saman við børnunum, teimum ungu og foreldrum/avvarandi taka evnið góður atburður upp, tá fimleikaárið byrjar. Hetta kann verða gjørt á felagsfundi, har leiðreglurnar verða gjøgnumgingnar, og tosað kann verða um, hvønn týdning hesar leiðreglur hava.

Leiðreglur eru galdandi fyri:

- ✓ góðan atburð hjá vaksnum íðkandi
- ✓ góðan atburð hjá foreldrum
- ✓ góðan atburð hjá børnum
- ✓ góðan atburð hjá dómarum og hjálparfólki
- ✓ góðan atburð hjá leiðarum
- ✓ góðan atburð hjá venjarum

Mannagondir í samband við ósømiligan atburð.

Føroya Fimleikasamband góðtekur ikki ósømiligan atburð móti venjarum, samskiparum, liðleiðarum, fimleikarum, foreldrum og øðrum, sum eru við í fimleikahópinum.

Munnligar ella skrivligar ónáðir/plágur, so sum ókvæmisorð, ósakligar ákærur ella annar ørkymlandi atburður, verða ikki góðtiknar/loyvdar.

Óhóskandi atburður, í samband við kappingar, legur og túrar innanlands og uttanlands, verður ikki góðtikin/loyvdur.

Góðtikið verður heldur ikki at tosað verður ljótt, ella at annar keðiligur atburður verður mótvegis dómarum, kappingarneytum, fimleikarum venjarum, foreldrum ella áskoðarum.

Føroya Fimleikasamband ynskir, at tey, sum eru knýtt at fimleikaumhvørvinum, nýta sømiligan málburð.

Samskiparar/venjarar, sum bróta hesar leiðreglur, fáa eina ávaring frá FFS.

- Fyrstu ferð ein samskipari/venjari brýtur hesar leiðreglur ella hevur óhepnan atburð, fær viðkomandi eina munnliga ávaring frá FFS.
- Aðru ferð fær viðkomandi eina skrivliga ávaring frá FFS um burturvísing frá t.d. kapping.
- Triðju ferð fær viðkomandi eina beinleiðis burturvísing – tíðaravmarkað ella varandi.
- Í serligum førum kann brot á hetta etiska regluverk hava við sær, at viðkomandi verður útihýstur á staðnum, og/ella fyribils ella varandi útihýstur frá luttøku í virksemi, venjingum, kappingum og øðrum tiltøkum undir Føroya Fimleikasamvandi uttan ávaring.

Góður atburður hjá vaksnum íðkandi

At vísa virðing fyri kappingarneytum, dómarum og hjálparfólki er eitt tað týdningarmesta, tú eigur at hava í huga alt árið, bæði undir venjing og til kappingar.

Tey flestu íðkandi søkja tey virðir, sum liggja í fimleikinum. Í fimleiki fært tú nógvar góðar upplivingar: gleði, felagsskap, avbjóðingar, spenning, avrik og menning. Í so máta minnir fimleikurin um spæl, og aftan fyri upplivingar liggja djúpari virðir.

Í fimleikinum fáa tey íðkandi ítøkiliga og beinleiðis roynt seg, hvørji tey eru, hvørjum máli tey kunnu røkka, og tey kunnu royna seg í samanburði við onnur menniskju. Í fimleikinum kann tann íðkandi granska sín samleika og síni sermerki. Soleiðis kann fimleikurin gerast ein vígvøllur, har menniskju vaksa og mennast.

Men í fimleikinum rúmast eisini kappingar og ósemjur/kreppur. Og stórar ósemjur kunnu hava niðurbrótandi avleiðingar. Kappingin kann gerast eitt stríð um at útvega sær vinning uttan fyri ítróttin: viðurkenning og fíggjarligan fyrimun. Í kappingum kenna summi ótta fyri at tapa. Onnur gera á eirindaleysan hátt alt fyri at vinna. Soleiðis kann fimleikurin eisini gerast ein vígvøllur, har menniskju og menniskjalig virði verða vanvird/niðrað.

Hesir normar sipa til atburð og hugburð hjá teimum, sum søkja tey jaligu virðini í fimleikinum:

- ✓ Ger altíð tað, tú megnar!
- ✓ Vís sóma, annaðhvørt tú sigrar ella tapir!
- ✓ Halt reglur og normar fyri reiðiliga kapping!
- ✓ Set heilsuna fremst og slepp tær undan óneyðugum heilsuvanda!
- ✓ Virð avgerðir hjá dómarum og hjálparfólki!
- ✓ Virð, at hini eisini hava gávur, møguleikar og eru dugnalig – uttan mun til kyn, húðarlit, tjóðskaparligt, politiskt ella átrúnaðarligt tilknýti eins og kynsliga sannføring!
- ✓ Brúka ikki ókvæmisorð og tosa ikki niðrandi um tey, sum eru uppi í fimleikinum!
- ✓ Samarbeið opið og erliga við venjarar og onnur, sum stuðla tær!
- ✓ Tak sjálv/ur høvuðsábyrgdina fyri tínari fimleikaligu menning og tínum avrikum!
- ✓ Vís góðan atburð bæði í kappingum, og tá ið kappingar ikki eru. Minst til, at tú kanst vera ein fyrimynd!
- ✓ Góðtak ongantíð hóttandi ella valdsliga atferð!
- ✓ Gang ikki venjaranum ov nær!
- ✓ Fløk teg ikki upp í dopingmisnýtslu!

Góður atburður hjá foreldrum

Foreldur hava ein týdningarmiklan leiklut í fimleikinum. Tað er av størsta týdningi at eggja børnum at sýna góðan atburð – samstundis sum tú sýnir góðan atburð á síðulinjuni.

- ✓ Minnst til, at barn títt er uppi í fimleikinum fyri egna gleði og ikki tína!
- ✓ Tú skalt eggja barni tínum at vera við, ikki noyða tað!
- ✓ Tú skalt eggja barni tínum at halda seg til reglurnar og at loysa ósemjur uttan fíggindaskap ella harðskap!
- ✓ Stuðla og eggja øllum børnum, sum eru uppi í venjing ella kapping – ikki bert tínum egna!
- ✓ Verið jalig, bæði tá ið tað gongur við, og tá ið tað gongur ímóti!
- ✓ Halt ongantíð eitt barn fyri gjøldur og rópa ikki eftir tí, um tað ger onkran skeivleika!
- ✓ Minst til, at børn læra best av fyridømum. Halt nógv um góða venjing og góð avrik hjá øllum børnum og ungum!
- ✓ Virð avgerðir hjá dómarum og hjálparfólki, og lær børnini og tey ungu at gera tað sama!
- ✓ Virð sjálvbodnar venjarar, leiðarar og sjálvboðin hjálparfólk. Vóru hesi fólk ikki, hevði barn tykkara ikki kunnað tikið lut í venjingum og kappingum! Virð rættindi og tign hjá hvørjum einstøkum barni – uttan mun til kyn, húðarlit, tjóðskaparligt ella átrúnaðarligt tilknýti!

Góður atburður hjá børnum

Fimleikur hjá børnum skal vera fragd og stuttleiki. Tí er neyðugt við nøkrum leiðreglum, hvussu góður atburður hjá børnum skal vera.

Tað, sum eyðkennir góðan barna- og ungdómsítrótt er, at tey íðkandi trívast, at so nógv sum møguligt vilja vera við, at tey mennast kropsliga, sálarliga og sosialt. At læringin er lagað til aldur, menningarstig og tørv hjá tí íðkandi. At tann íðkandi skal kunna kenna, at hann tíðum megnar nakað og kennir framgongd við at verða vegleiddur og eggjaður. Venjingin leggur dent á spæl.

Yvirskipaðu málini við barna- og ungdómsítróttinum eru at geva tí íðkandi møguleika fyri fjølbroyttari menning og møguleika at megna ymiskt og síðani í tannárunum møguliga at velja ávísa sergrein. Á henda hátt kann grundarlag verða lagt undir ein varandi hug at íðka ítrótt og at vera kropsliga virkin. Avrik skulu ikki verða sett fram um læring. Tó má ásannast, at ítróttur tíverri ikki altíð verður framdur við hesum hugsjónum. Tey vaksnu kunnu hava framsøkni og kunnu seta mál uttan mun til fortreytirnar hjá teim ungu og børnunum. At velja sergrein tíðliga og venja við kapping fyri eyga kann hava óhepnar fylgjur fyri bæði kropsligu, sálarligu, sosialu og moralsku menningina.

Barna- og ungdómsítrótturin hevur tørv á venjarum og leiðarum, sum hava hollar førleikar og geva teimum grundleggjandi virðunum gætur.

Hesir normar eyðkenna góðan barna- og ungdómsítrótt:

Góður atburður hjá børnum upp í 15 ár:

- ✓ Ger altíð títt besta!
- ✓ Akta altíð reglurnar og normarnar fyri reiðuligum spæli í fimleikinum!
- ✓ Ver við í fimleikinum, tí tær dámar tað og ikki tí tey vaksnu, foreldur og venjarar vilja tað!
- ✓ Vís virðing fyri øllum, sum eru uppií, liðfelagar, eins og kappingarneytar!
- ✓ Ikki trætast við dómarar ella onnur hjálparfólk!
- ✓ Virð og ver opin og erligur mótvegis venjarum og samskiparum/leiðarum, tí teir hava ábyrgd fyri tær!
- ✓ Lat vera við at kalla spottandi ella niðrandi. Hvørki liðfelagar, kappingarneytar, dómarar, hjálparfólk, venjarar ella samskiparar/leiðarar!
- ✓ Ver móti øðrum, sum tú vilt, at tey skulu vera móti tær!

Góður atburður hjá dómarum og hjálparfólki

Dómarar og hjálparfólk eru í lyklastøðu, tá ið tað ræður um at menna fimleikin. Tey skulu stremba eftir at vera rættvís og reiðilig.

Týdningarmesta uppgávan hjá dómaranum er at tryggja, at kappingarfimleikurin fer fram á rættvísan og reiðiligan hátt. At hugmálini hjá fimleikinum verða varðveitt. Tí hevur dómarin ein týðandi leiklut, tá ið ræður um at menna fimleikin.

Ein góður dómari ger ikki mannamun, er reiðiligur, rættvísur og avgjørdur. Vitan og førleikar hjá einum dómara eru líka so virðingarverd sum vitan og førleikar hjá einum góðum venjara ella íðkandi. Fimleikurin er rættiliga bundin at avrikum dómarans. Dómaragerningurin krevur virðing. Valdstøða dómarans kann eisini verða brúkt at bróta niður. Ein óreiðiligur dómari, ið ger mannamun ella talar niðrandi til aðrar dómarar, er ein beinleiðis hóttan ímóti hugmálum fimleiksins.

Ein dómari skal verða førleikamentur til hvørja kapping, og aðrar uppgávur sum kravdar verða av honum, og hevur rætt at taka og standa við avgerðir sum tiknar eru. Í úrvalsfimleiki kunnu kappingarúrslit hava nógv at siga, bæði hvat viðvíkur virðing og fíggjarligum avleiðingum. Ein veikur dómari kann lata seg freista av trongum egin áhugamálum og kann við at taka skeivar avgerðir oyðileggja kappingina.

Hesir normar sipa til atburð og hugburð hjá tí góða dómaranum:

- ✓ Ger ikki mannamun!
- ✓ Set tær altíð fyri at fremja tey avrik, sum ítróttargreinin fimleikur krevur!
- ✓ Legg fram um alt dent á trygd og trivnað hjá teim íðkandi!
- ✓ Vís virðing fyri teimum íðkandi, venjarum og viðhaldsfólki, og ver til reiðar at grundgeva tínar avgerðir!
- ✓ Tak ábyrgd fyri teimum avgerðum, ið tiknar verða!
- ✓ Leita tær vitan, og ver altíð dagførdur um menningina í fimleikinum!
- ✓ Brúka ikki ókvæmisorð ella niðrandi talu um aðrar dómarar ella fólk, sum eru uppi í fimleiki!
- ✓ Far við øllum íðkandi á líkaverdugan hátt – uttan mun til kyn, húðarlit, tjóðskaparligt, politiskt og átrúnaðarligt tilknýti og kynsliga sannføring!
- ✓ Brúka ongantíð títt virki sum dómari til at røkja egin áhugamál, um tey ganga ímóti áhugamálunum hjá teim íðkandi ella fimleikinum sum heild!